# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B □ P.O.Box 1134 □ FO-110 Tórshavn □ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 □ Fax +298 314489 □ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**R-E012-3**

# Reglugerð
# um
# Stinkskáp - sporgasskanning og responstíð

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaraverd frá 24. juni 1974 við seini broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð.

### *1. Almenn krøv.*

1.1 Sum høvuðsregla skal handfaring av heilsuskaðiligum evnum og tilfari á starvsstovum fara fram í afturlatnum hanskaboksum. Kann hetta av tøkniligum ávum ikki lata seg gera, skal slíkt arbeiði gerast í stinkskápum, ið eru góðkend sambært Dansk standard nr. DS 457.

1.2 Fyri at tryggja starvsfólkunum á hesum starvsstovum móti heilsuskaðiligum árini, skulu øll stinkskáp sporgasskannast, tá hesi eru uppsett av nýggjum og tá størri broytingar í nýtsluni og útgerðini verða framd.

1.3 Tað skal altíð fyriliggja ein sporgasskanning eftir DS 457 fyri stinkskáp, ið váttar virkisføri av stinkskápinum.

1.4 Ein eftirlitsskipan skal verða sett upp, sum boðar frá, tá skápið ikki virkar sum ætlað. Eftirlitsskipanin (t.d. ein pressostatur) skal loysa út eina ávaring, ið er skipað sum ljós- og/ella ljóðávaring, sambært galdandi kunngerð nr. K-A005-1 um trygdarskelting og signalering v.m. frá 11. november 1996.

1.5 Av tí at ventilatiónsrør vanliga hava ein ávísan leka, skal ventilatorurin frá stinkskápi støðast soleiðis, at bert súgvirørini eru innandura, t.v.s. at ventilatorurin skal støðast uttandura ella beinleiðis við útvegg og við lufttættari gjøgnumføring útum.

1.6 Stinkskáp og ventilatiónsskipanin (kanalir v.m.) skulu haldast viðlíka, herundir haldast forsvarliga reinar og javnan eftirhyggjast. Stinkskáp skulu eftirhyggjast í minsta lagi eina ferð um árið.

1.7 Um tað ikki á annan hátt kann váttast, at virkisføri hjá stinkskápunum er óbroytt, skal tað árliga eftirlitið við stinkskápunum í minsta lagi umfata eina roykroynd og luftferðsmáting. Vísa hesar royndir og mátingar eina broyting uppá meira enn 10% , skal nýggj sporgasskanning eftir DS 457 gerast.

1.8 Við størri broytingum av nýtsluni av stinkskápinum, t.d. ein nýggj royndaruppseting, sum broytir ventilatiónsviðurskiftini í skápinum, ella við nýtslu av meira heilsuskaðiligum evnum, skal nýggj sporgasskanning eftir DS 457 gerast, fyri at kanna virkisføri hjá skápinum, áðrenn slík arbeiði verða framd.

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 13.02.1997
Kunngerð nr. K-A009-1 um trygdarskelting og signalering v.m. frá 11.11.1996

***Útgivið fyrstu ferð:***

**26. oktober 1998**

***Seinastu broytingar:***

### *2. Responstíð.*

2.1 Stinkskáp skulu vera útgjørd við stigleysari stilling av útsúgvingarluftini. Stillingin av luftmongdini skal

tryggja, at uttan mun til opningshæddina av lúkuni, so skal luftferðin í lúkumunnanum altíð verða í minsta lagi 0,5 m/sek.

2.2 Responstíðin, sum er tann tíð, ið gongur frá tí at opningshæddin av lúkuni er broytt, til tann ynskta luftferðin í lúkumunnanum er rokkin, má í mesta lagi vera 1 sek.
Sambært útvegarum av stinkskápum og ventilatiónsskipanum hava nýggj stinkskáp eina responstíð, ið er minni enn 1 sek. Eisini kann luftmongdin stillast við hesi responstíð.

### *3. Annað.*

3.1 Tað er umráðandi, at øll fólk á starvsstovum, ið starvast við heilsuskaðiligum evnum og tilfari, fáa eina gjølla leiðbeining í hesum arbeiði og tí útgerð, ið krevst til hetta arbeiði, herundir nýtsluni av stinkskápum og øllum, ið hertil hoyrir, soleiðis at góð starvsstovupraksis verður sett í hásæti.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** 26. oktober 1998

Eli Davidsen, stjóri